INPACT INTERNATIONAL

# Stjóri

**Søkt verður eftir stjóra til uppboðssølu av fiski.**
P/F Fiskamarknaður Føroya, sum hevur høvuðsskrivstovu á Toftum, er í ferð við at vera umskipaður. Eitt nýtt felag undir stovnan skal yvirtaka uppboðssøluvirksemið hjá fyritøkuni. Umframt á Toftum rekur felagið uppboðssølu í Klaksvík. Talan er bæði um gólvuppboðssølu og telefonuppboðssølu.

**Uppgávurnar hjá stjóranum eru í høvuðsheitum hesar:**
- at fyriskipa og hava eftirlit við virksemi felagsins
- at hava eftirlit við bókhaldi, roknskapi og fíggjarstýringini
- at menna og samskipa teldukervið og innanhýsismannagongdir í fyritøkuni
- at gera tíðarskeiðsroknskapir og ársroknskapir og samanhalda hesar við fíggjarætlanir

**Førleikakrøv**
Tann, ið verður settur, skal hava:
- Hóskandi ástøðiliga útbúgving frá eitt nú handils- ella handilsháskúla.
- Leiðsluroyndir frá almennum ella privatum virksemi.
- Lætt við at samvinna við fólk.
- Evni at samskifta bæði í talu og skrift.

Tann, ið verður settur í starvið, kann vænta sær eitt spennandi, mennandi og áhugavert starv, har bæði eigarar, starvsfólk og onnur fara at vísa áhuga og seta krøv.

Lønarviðurskiftini verða avtalað við nevndina.

Starvið verður at seta skjótast gjørligt.

Meira fæst at vita um starvið við at tosa við Ólav Jøkladal.

Tey, ið ætla at søkja, skulu senda skrivliga umsókn við prógvum og møguligum ummælum í seinasta lagi 22. november 2004 til:

**P/F Grannskoðaravirkið INPACT**
statsaut. revisorar
Postrúm 191
110 Tórshavn

Stílað: Jógvani Amonsson
ella
t-postur: inpact@inpact.fo

Member of international network
of professional accountants

---

**Arbeiðshandskar**
**til øll endamál - bæði á sjógvi og landi**

Beinleiðis frá framleiðara

**Landsins største úrval**
frá eingangshandskum til
fóðraðar Japan-handskar

**ADC-Heilsølan** spf
Láarvegur 14 • 100 Tórshavn • Tel. 315828 • Fax 315893
adc@adc fo

Sosialurin 311820

---

INPACT INTERNATIONAL

# Stjóri

**Søkt verður eftir stjóra til landingarmiðstøð.**
P/F Fiskamarknaður Føroya, sum hevur høvuðsskrivstovu á Toftum, er við at verða umskipaður, so verandi felag framyvir bert skal vera landingarmiðstøð. Umframt á Toftum rekur felagið landingarmiðstøð í Klaksvík. Harafturat eigur felagið í P/F Landingarmiðstøðini á Tvøroyri.

**Uppgávurnar hjá stjóranum eru í høvuðsheitum hesar:**
- at fyriskipa og hava eftirlit við virksemi felagsins
- at hava eftirlit við bókhaldi, roknskapi og fíggjarstýringini
- at menna og samskipa teldukervið og innanhýsismannagongdir í fyritøkuni
- at gera tíðarskeiðsroknskapir og ársroknskapir og samanhalda hesar við fíggjarætlanir

**Førleikakrøv**
Tann, ið verður settur, skal hava:
- Hóskandi ástøðiliga útbúgving frá eitt nú handils- ella handilsháskúla.
- Leiðsluroyndir frá almennum ella privatum virksemi.
- Lætt við at samvinna við fólk.
- Evni at samskifta bæði í talu og skrift.

Tann, ið verður settur í starvið, kann vænta sær eitt spennandi, mennandi og áhugavert starv, har bæði eigarar, starvsfólk og onnur fara at vísa áhuga og seta krøv.

Lønarviðurskiftini verða avtalað við nevndina.

Starvið verður at seta skjótast gjørligt.

Meira fæst at vita um starvið við at tosa við Ólav Jøkladal.

Tey, ið ætla at søkja, skulu senda skrivliga umsókn við prógvum og møguligum ummælum í seinasta lagi 22.november 2004 til:

**P/F Grannskoðaravirkið INPACT**
statsaut. revisorar
Postrúm 191
110 Tórshavn

Stílað: Jógvani Amonsson
ella
t-postur: inpact@inpact.fo

Member of international network
of professional accountants

---

# Søkt verður eftir fólki

at arbeiða í vikuskiftum. Ring og hoyr nærri á tlf. 507929 ella 322006 (spyr eftir Heidi)

**Kvikkeyp,**
Hornabø, Tórshavn

---

TEKNISKI SKÚLIN
TÓRSHAVN

**søkir**

# lærara til maskindeildina

Starvið er eitt fulltíðarstarv.
Umsøkjarin skal hava sveinabræv sum maskinsmiður og minst 2 ára starvsroyndir innan yrkið.
Umsøkjarar við víðari útbúgving hava fyrimun.
Umsøkjarar, ið kunna undirvísa í stødd-, alis- og evnafrøði, í nýtslu av EDV, so sum: CAD/CAM, CNC hava somuleiðis fyrimun.
Á maskindeildini starvast 7 lærarar í føstum starvi, umframt tímalærarar og 1 verkstaðarhjálpari.
Á deildini er tað dagliga næmingatalið umleið 60, sum umfatar: Lærlingar og SIT-næmingar.

**Setanarkor til fast starv:**
Fyrstu 2 árini verða roknað sum royndartíð, har tann, sum verður settur í fast starv, má verða til reiðar at taka ta eftirútbúgving, tað verður seg pedagogiska/undirvísingarliga ella aðra førleikagevandi útbúgving, sum er neyðug fyri at verða settur í fast starv.

**Løn:**
Lønin verður sambært sáttmála millum Føroya Landstýri og FTL.

Starvið er sett at byrja 1. januar 2005.

Skrivlig umsókn við upplýsingum um útbúgving, viðmælum og starvstíð skal verða skúlanum í hendi í seinasta lagi týsdagin 23. november 2004.

Meira fæst at vita um starvið, við at venda sær til Helga Mortensen, leiðandi lærara á maskindeildini á tlf. 515872.

**TEKNISKI SKÚLIN Í TÓRSHAVN**
Marknagilsvegur 75 · Postsmoga 239
FO-110 Tórshavn
e-mail: tst@tst.fo
Heimasíða: www.tst.fo

---

# Norðoya Javnaðarfelag

**Hugnakvøld verður í Bøgøtu 3**

leygarkvøldið 6. november kl. 19.00 við undirhaldi, sangi og ábiti.

Sunnukvøldið 7. nov. verður opið hús og mánakvøldið 8. nov. verður musikk café frá kl. 20.00 í hølum felagsins viðklaksvíksvegin 68.

Valdagin 9. nov. er opið hús frá kl. 10.00.

Tey, ið ynskja bil á valstaðið kunnu ringja á telf. 261232 ella til eitt av valevnunum.

Vælkomin
**Nevndin**

---



# Erogterapeutur/ Fysioterapeutur

til

## Hjálpartólamiðstøðina (HTM)

Á HTM er eitt fulltíðarstarv sum málsviðgerandi Ergoterapeutur/Fysioterapeutur leyst at seta beinanvegin.

HTM er deild á Almannastovuni og umsitur hjálpartól, umbyggingar í heiminum og avlamisbilar til fólk, ið bera brek. Í løtuni starvast 13 fólk á HTM.

**Uppgávurnar hjá HTM umfata m.a.**
- málsviðgerð og støðutakan til umsóknir um sertillagað hjálpartól, bústaðarbroytingar og avlamisbilar.
- upplýsing, ráðgeving og leiðbeining til borgarar, almennar myndugleikar o.o. um hjálpartól og byggi- og bústaðarspurningar
- útlán og endurnýtsla av hjálpartólum
- tvørfakligt samstarv - innan- og uttanhýsis

**Vit sóknast eftir einum starvsfelaga sum hevur:**
- útbúgving sum ergoterapeutur / fysioterapeutur
- royndir frá líknandi arbeiði
- kunnleika til at arbeiða við fólki við niðursettum førleika
- kunnleika til almannalóggávuna
- evnir at seta í verk fyriskipanir
- góð samstarvsevnir
- góð evnir at orða seg bæði munnliga og skriftliga
- telduførleika á brúkarastøði

**Vit kunnu bjóða:**
- sjálvstøðugt arbeiði
- flextíð
- tætt samstarv við starvsfelagarnar
- tvørfakligt samarbeiði
- fakligt mennandi umhvørvi

Løn og setanartreytir sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og viðkomandi yrkisfelag.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Palla Mortensen leiðara á HTM tel. 358300.

Umsókn við avriti av viðkomandi skjølum skal sendast til
**Hjálpartólamiðstøðina,**
**Postboks 1049,**
**110 Tórshavn**

**Umsóknarfreist:** týsdagin 23. november 2004

---

# Nýggjar TANNPROTESUR

**Broytingar og umvælingar av gomlum protesum**

Kliniskur tannteknikari
Bergur á Reynatrøð

Opið er:
mánadag-hósdag frá kl. 9-16
fríggjadag frá kl. 9-12

Børkuvegur
620 Runavík
Tlf. 448480

---

FØROYA LANDSSTÝRI

# Fiskivinnuroyndir 2005

Lýsing eftir umsóknum

Fiskivinnuroyndir er ein játtan hjá Fiskimálaráðnum, sum stuðlar undir gransking og menning innan fiskivinnuna:

Fiskimálaráðið hevur gjørt av, at verkætlanir innan fylgjandi økir hava fyrimun:
- Fiskiskapur við ábyrgd
- Royndarveiða, framleiðsla og søla
- Virðisøking av fiski
- Búskaparlig og samfelagslig menning av fiskivinnuni
- Heilsa, trygd og umhvørvi

**Hvør kann søkja?**
Fyritøkur, almennir stovnar og einstaklingar kunnu søkja um stuðul úr Fiskivinnuroyndum.

Um tørvur er á at orða hugskot til ítøkiligar verkætlanir ber til at seta seg í samband við samskiparan um hetta.

Umsóknir skulu vera samskiparanum í fiskivinnugransking í hendi í seinasta lagi mánadagin 15. nov. 2004 kl. 12.00.

**Meira fæst at vita:**
Programm, umsóknarbløð, vegleiðingar og annað kunnandi tilfar fæst á heimasíðu okkara www.fvg.fo

Áhugað eru vælkomin at venda sær til Maritu Rasmussen, samskipara, við møguligum spurningum.

Fyrivarni verður tikið fyri játtan á Løgtingsins fíggjarlóg fyri 2005.

Marita Rasmussen, samskipari
Tlf.: 35 30 30
fartel.: 22 80 01
t-post: maritar@fisk.fo

Umsóknir skulu sendast til:

**Fiskimálaráðið**
**Samskiparin í fiskivinnugransking**
**Yviri við Strond 17**
**FO-100 Tórshavn**

---

# Frá Nes kommunu

Uppskot um veganøvn í Nes kommunu liggja frammi til alment eftirlit á kommunuskrivstovuni frá 8. nov. til 12 nov. báðir dagar íroknaðir.

Hetta tíðarskeiðið er kommunuskrivstovan opin frá kl. 10.00 til kl. 15.00.

Møguligar viðmerkingar skulu vera kommununi í hendi í seinasta lagi 26. nov. 2004 kl. 15.00.

**Nes kommuna**

---

# Pedagogur ella hjálparfólk

Hevur tú hug at arbeiða á lítlum dagstovni í hugnaligari bygd, so er hetta møguliga nakað fyri teg. Dagstovnurin í Kvívík søkir pedagog, 40 tímar um vikuna, at byrja 1. desember 2004, ella eftir nærri avtalu.

Løn og setanarviðurskifti eru samb. sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðarafelag Føroya.

Dagstovnurin í Kvívík er samansettur stovnur og heldur til í tveimum ymiskkum húsum í bygdini. Ein vøggustovubólkur við 10 børnum og ein barnagarðsbólkur við 20 børnum eru í tí eina húsinum, meðan ein bólkur við 6 av teimum elstu barnagarðsbørnunum og 6 børnum í skúlaaldri er í einum øðrum húsum í bygdini.

Tað er barnagarðsbólkurin, sum hevur brúk fyri einum pedagogi, tí verandi pedagogur hevur valt at søkja nýggjar avbjóðingar. Vit kunnu bjóða hugnaligar arbeiðsumstøður, fitt og krevjandi børn og góðar starvsfelagar. Innandura hava vit ikki nógv pláss, men vit hava góðar møguleikar fyri at brúka náttúruna í nærumhvørvinum.

Okkara mál við arbeiðinum er at skapa tryggar og mennandi umstøður fyri børn og vaksin innan fyri teir karmar, sum kommunan setur fyri virksemi okkara.

Vit ynskja umsøkjarar við viðkomandi útbúgving og royndum, hugi at arbeiða við børnum, hugflogi og løttum sinnalag. Meira kann fáast at vita um starvið og viðurskiftini við at tosa við Bjarna Clementsen, leiðara á telefon 214360.

Umsóknir við prógvum, viðmælum og CV skulu vera stovninum í hendi innan 20. november 2004. Um starvið ikki verður sett við pedagogi, so verður starvið sett tíðaravmarkað við fólki við øðrum førleika. Pedagoglesandi, sum vænta at verða liðugt útbúgving í februar 2005, eru eisini vælkomin at søkja.

**Dagstovnurin í Kvívík**
Att. leiðarin
FO 340 Kvívík
Tlf. 421660

---

# Skip- & Bátar GSM-Telefonir

**Nú GSM netið verður útbygt til skip og bátar**

hava vit tær vælumtóktu Nokia 6090
GSM telefonirnar til fastmontering.
GSM-telefon sum kann senda og móttaka.
Telefon, data, fax og SMS.
Ein sera væl umtókt GSM-telefon til skip og bátar.
Somuleiðis hava vit fleiri model
Procom GSM antennum.
Avmarka nøgd á goymslu.
Tann, sum kemur fyrst til mylluna.

**Sp/f Contrive Jsp Ltd.**
P. O. Box 72 · 700 Klaksvík
Tlf. 455244 – 214244 – 215660 · Fax 456945
E-mail: contrive@contrive.fo